-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK
Skrás.: 28-06-96
Km.: 78.000
Prísur: 179.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 AUT. GEAR
Skrás.: 17-04-96
Km.: 62.000
Prísur: 103.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SED.
Skrás.: 30-04-98
Km.: 24.000
Prísur: 148.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B
Skrás.: 16-10-97
Km.: 52.000
Prísur: 103.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli Aut.gear
Skrás.: 13-06-96
Km.: 82.000
Prísur: 127.600,- Garanti*

TOYOTA STARLET 1,3 Xli 5 HURÐAR
Skrás.: 27-08-97
Km.: 38.000
Prísur: 72.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,6 CDX (Sýnaður 01-00)
Skrás.: 16-10-96
Km.: 39.000
Prísur: 117.600,- Garanti*

VOLVO 460 SEDAN (Sýnaður 06-99)
Skrás.: 25-05-90
Km.: 92.000
Prísur: 48.600,-

TOYOTA CARINA E 1,8 L/B
Skrás.: 30-12-93
Km.: 140.000
Prísur: 89.600,- Garanti*

HONDA ACCORD 1,8
Skrás.: 01-11-97
Km.: 53.000
Prísur: 148.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN (Sýnaður 03-00)
Skrás.: 30-05-94
Km.: 107.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

OPEL ASTRA 1,7 TURBO DIESEL
Skrás.: 31-07-96
Km.: 105.000
Prísur: 99.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Gli (Sýnaður 03-00)
Skrás.: 02-07-90
Km.: 170.000
Prísur: 65.600,-

FORD ESCORT 1,8 DIESEL
Skrás.: 13-12-95
Km.: 87.000
Prísur: 78.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Xli
Skrás.: 19-10-90
Km.: 122.000
Prísur: 57.600,-

FORD MONDEO 2,0 AIR-CON
Skrás.: 02-07-96
Km.: 52.000
Prísur: 120.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 Xli (Sýnaður 09-00)
Skrás.: 11-06-91
Km.: 108.000
Prísur: 48.600,-

FORD FIESTA 1,3i CL (Sýnaður 12-99)
Skrás.: 08-06-91
Km.: 130.000
Prísur: 30.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN
Skrás.: 25-02-98
Km.: 42.000
Prísur: 119.600,- Garanti**

FORD FIESTA 1,8 DIESEL
Skrás.: 27-07-93
Km.: 115.000
Prísur: 58.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 7.000
Prísur: 119.600,- Garanti**

KIA SEPHIA 1,5
Skrás.: 17-04-97
Km.: 59.000
Prísur: 62.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA (Sýnaður 12-99)
Skrás.: 01-05-95
Km.: 139.000
Prísur: 87.600,- Garanti*

SUZUKI BALENO 1,6 GLX
Skrás.: 26-06-96
Km.: 52.000
Prísur: 82.600,- Garanti*

AVHEINTINGAR-TILBOÐ

TOYOTA CAMRY 1,8 XL (Sýnaður 04-99)
Skrás.: 30-06-88
Km.: 240.000
Prísur: 15.600,-

TOYOTA CARINA 1,6 DX (Sýnaður 05-00)
Skrás.: 09-06-87
Km.: 221.000
Prísur: 15.600,-

VW TRANSPORTER
Skrás.: 17-02-87
Km.: 190.000
Prísur: 8.600,- V/ DUP. KABINU

VØRUVOGNAR

TOYOTA DYNA 150 V/ LAST
Skrás.: 24-02-97
Km.: 100.000
Prísur: 90.600,-

VW LT 35 VAN
Skrás.: 30-06-93
Prísur: 39.600,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00
TOYOTA Reyni Service TOYOTA TOYOTA
Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820

Búskapurin skilir partarnar

Danski forsætisrá›harrin vísti á tí›indafundinum eftir samrá›ingarnar hóskvøldi› á, at ta› er spurningurin um skiftistí›ina, sum er høvu›sorsøkin til, at samrá›ingarnar slitna›u

SAMRÁ‹INGAR
Magnus Dam og John Johannessen Keypmannahavn

Poul Nyrup Rasmussen er ikki í iva um, at ta› er tann búskaparligi parturin, sum skilir partarnar, tá velst um føroyskt fullveldi

– Ta›, sum skilir okkum er fyrst og fremst búskapur. Ta› sum skilir okkum er, um skiftistí›in skal vera f‡ra ár, fimtan ár ella meira.

Hesi vóru or›ini hjá danska forsætisrá›harranum á tí›indafundinum í forsætisrá›num beint eftir, at samrá›ingarnar um føroyskt fullveldi eftir tí leisti, landsst‡ri› hevur lagt upp til, slitna›u í forsætisrá›num hóskvøldi›.

Poul Nyrup Rasmussen vísti á, at danska stjórnin metir hetta vera veruligu orsøkina til, at landsst‡ri› ikki longur vil samrá›ast eftir verandi grundarlag.

Kjak um jura

Forsætisrá›harrin sipa›i til, at landsst‡ri› hevur funni› eina ósemju um jura, sum ta› kann heingja samrá›ingarsliti› ella kanska vantandi samrá›ingarúrsliti› uppá.

– Í kvøld hava vit havt eitt drúgt kjak um jura, sum eg ikki haldi hoyrir heima í hesum samrá›ingunum. Ta› er greitt, at danska stjórnin vir›ir eina avger› frá føroyska fólkinum um fullveldi. Hetta hevur ein brei›ur meiriluti á Fólkatingi greitt bo›a› frá. Vit hava sta›festi, at ta› er føroyska fólki› einsamalt, i› ger av, hvør framtí›arstø›a teirra skal ver›a. Grei›ari kann ta› ikki vera, sló› danski forsætisrá›harrin fast í sambandi vi› kjaki›, um Føroyar eru ein tjó› ella ikki.

Poul Nyrup Rasmussen vísti á, at ta› ikki ber til at hava eitt løgfrø›isligt kjak um, hvørt Føroyar eru ein tjó› ella ikki, eins og landsst‡ri› vildi á samrá›ingarfundinum.

– Danska stjórnin er í teirri stø›u, at hon í hesum sambandi skal halda seg til grundlógina. Tí kann danska stjórnin ikki sta›festa, at Føroyar eru eitt »sjálvstø›ugt fólkarættarligt subjekt«, sta›festi danski forsætisrá›harrin.

Poul Nyrup Rasmussen vísti á, at danska stjórnin hevur skoti› upp fyri landsst‡rinum, at ta› skal lata føroyska fólki› skal gera av, um vit skulu halda fram undir verandi skipan, menna eitt sjálvst‡ri, ella um Føroyar skulu hava fullveldi.

Umhugsa stø›una

- Bá›ir partarnir skulu nú umhugsa stø›una, sum er íkomin. Og einafer›, tá bá›ir partar eru klárir til at fara aftur til samrá›ingarbor›i›, skulu teir bo›a frá hesum. Hetta eru bá›ir partar samdir um, seg›i Poul Nyrup Rasmussen, sum annars harmast um, at stø›an er vor›in, sum hon er nú.

Landsst‡ri› sigur, at ta›, eftir at hava rá›ført seg vi› uttanlandsnevndina, fer at skjóta upp fyri løgtinginum at leggja solei›is til rættis, at føroyingar sjálvir skipa eina trygga skiftistí›. Vi› hesum grundarlag skal Føroya fólk taka avger› um framtí›arstø›u sína á eini fólkaatkvø›u.

Eftir hesa fólkaatkvø›una, ætlar landsst‡ri› undir aftur samrá›ingar vi› donsku stjórnina um, hvussu avger›irnar ver›a settar í verk.

Fer landsst‡ri› aftur til samrá›ingar, ver›ur talan ikki um eitt framhald av samrá›ingunum higartil. Danski forsætisrá›harrin gjørdi á tí›indafundinum greitt, at tá fari› ver›ur undir aftur samrá›ingar, er talan um heilt n‡ggjar samrá›ingar. Forsætisrá›harrin vísti í hesum sambandi á møguleikan fyri at samrá›ast um øki fyri øki, solei›is at Føroyar spakuliga menna seg til at gerast sjálvstø›ugar.

Poul Nyrup Rasmussen sta›festi eisini, at møguleikin, sum føroyingar altí› hava havt fyri at yvirtaka málsøki, sjálvandi framvegis er til sta›ar – samrá›ingar um fullveldi ella ikki.

– Hetta er kortini ikki naka›, sum ver›ur tiki› upp aftur í fullveldissamrá›ingunum, men ein generellum møguleiki, sum føroyingar hava í dag, um ta› skal vera, seg›i danski forsætisrá›harrin.

Andstø›an vil hava n‡val

Bæ›i Sambandsflokkurin og Javna›arflokkurin halda, at landsst‡ri› hevur koyrt seg fast í fullveldissamrá›ingunum, og tí má n‡val skrivast út

SAMRÁ‹INGAR
Ey›un Klakstein

Teir bá›ir stóru andstø›ulei›ararnir, Jóannes Eidesgaard og Edmund Joensen, halda, at tá i› samgongan hevur rent seg fasta í høvu›ssetninginum at fáa fullveldi, so eiga hon at taka avlei›ingarnar og skriva út n‡val

Stóru andstø›uflokkarnir í løgtinginum eru ikki í iva um, hvat landsst‡ri› skal gera, eftir at samrá›ingarnar vi› danir slitna›u hóskvøldi›.

Ney›ugt er vi› einum n‡vali, so Føroya fólk kann siga sína hugsan í hesum máli.

– Ta› er vanligt, at tá ein stjórn hevur lagt stóran dent á eitt mál, og at ta› ikki eydnast teimum at gjøgnumføra ta›, so fer stjórnin frá, ella n‡val ver›ur útskriva›. Landsst‡ri› eigur eisini at ásanna, at teir ikki koma longur vi› síni ætlan, og so átti n‡val at veri› skriva› út, sigur Jóannes Eidesgaard, forma›ur í Javna›arflokkinum.

Hetta er ta› sama, sum Sambandsflokkurin mælir til eftir samrá›ingarnar hóskvøldi›.

– Tann besta fólkaatkvø›an er eitt n‡val, og ta› mæla vit til. Landsst‡ri› hevur í hálvtanna› ár arbeitt vi› at fáa fullveldi, og treytirnar fyri tí eru nú grei›ar, men landsst‡ri› torir ikki at taka av tilbo›num, sigur Edmund Joensen.

Treytirnar grei›ar

Bæ›i Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard halda, at landsst‡ri› nú roynir at uppfinna trupulleikar fyri at fáa eyguni vend frá veruligu samrá›ingunum.

– Landsst‡ri› roynir at lei›a samrá›ingarnar inn á eitt kjak um fólkarætt og statsrætt, og ta› ver›ur gjørt, tí landsst‡ri› ikki vil kennast vi› ta› úrslit, sum ta› er komi› til í samrá›ingunum vi› donsku stjórnina, sigur Jóannes Eidesgaard, forma›ur Javna›arfloksins.

– Føroyingar fáa fullveldi, um vit ynskja ta›, og treytirnar fyri tí eru eisini grei›ar. Men landsst‡ri› veit, at avtalan er so vánalig, at teir tora ikki at leggja hana fyri Føroya fólk. Tí royna teir nú at leggja roykslør um veruligu samrá›ingarnar vi› fara at tosa um fólkarætt.

Mugu rudda upp

Forma›urin í Sambandsflokkinum, Edmund Joensen, vísir á, at landsst‡ri› í hálvt tri›ja ár hevur arbeitt vi› fullveldisætlanini, men hevur ikki fingi› ta› úrsliti› burtur úr, sum landsst‡ri› ætla›i at fáa.

– Samrá›ingarnar eru koyrdar fastar, og nú roynir landsst‡ri› at skapa n‡ggjar trupulleikar fyri at fáa fólk at gloyma ta› úrsliti›, sum teir fingu í samrá›ingunum. Landsst‡ri› hevur roynt at fingi› fullveldi, men ta› miseydna›ist, og nú er ney›ugt at ta› ver›ur rudda› upp politiskt, sigur Edmund Joensen.

– Ta› er eingin meining í at hava eina fólkaatkvø›u næsta ár, og tí skal landsst‡ri› vi›urkenna stø›una, sum ta› er komi› í, og útskriva n‡val, so Føroya fólk kann taka stø›u í málinum.

Nú er ney›ugt at spyrja føroyingar

– Ta› er ikki meiri at samrá›ast vi› danir um, heldur Mi›flokkurin

SAMRÁ›INGAR
Áki Bertholdsen



Nú má fólkaatkvø›a ver›a í Føroyum, so at vit fáa at vita, hvat føroyingar vilja innast inni, heldur Bill Justinussen, skrivari hjá Mi›flokkinum

– Ta› er ongin orsøk til at halda fram vi› samrá›ingunum vi› danir um fullveldi›.

Ta› heldur Bill Justinussen, skrivari hjá tí minsta andstø›uflokkinum, Mi›flokkinum.

Hann sigur, at ta› nú er ney›ugt, at føroyingar sleppa at siga sína hugsan um framtí›arstø›u Føroya á eini fólkaatkvø›u.

Men Bill Justinussen sigur, at ta› skal ver›a ein fólkaatkvø›a, har veljarin fær fleiri møguleikar at velja ímillum, líka frá óbroyttum heimast‡ri til loysing, so at allir møguleikar ver›a l‡stir.

– Ta›, sum hevur størst t‡dning er at vita, hvat føroyingar sjálvir vilja innast inni. Og á eini fólkaatkvø›u sleppur veljarin at taka stø›u útfrá teimum treytum sum eru vi› f‡ra ára skiftistí›, og hvat danir annars kunnu ganga vi› til. Máli› er so miki› væl l‡st nú, at føroyingar vita, hvar teir flóta.

Hinvegin heldur Mi›flokkurin ikki, at ta› er rætt at hava løgtingsval á hesum grundarlagnum.

Bill Justinussen heldur eisini avgjørt, at ta› var rætt av landsst‡rinum at tvíhalda um, at danir skulu vi›urkenna, at vit eru ein tjó›.

– Vit hava altí› følt okkum sum eina tjó›. Spurningurin er bara fyrst og fremst um vit eru ein tjó› í eygunum á ø›rum tjó›um. Men nú er ta› so sligi› fast, at danir meta okkum ikki sum eina tjó› í altjó›a høpi og haldi, at ta› var rætt av landsst‡rinum ikki at slaka í hesum sambandi. Landsst‡ri› heldur, at hesin trupulleikin kann loysast vi› einum brævi til ST, men ta› dugi eg ikki at meta um, sigur Bill Justinussen.

FLÚGV BÍLIGA
til Danmarkar og Íslands

Heystferðir
Frá 23. oktober til 15. desember
Til Keypmannahavnar og aftur
Úr Keypmannahavn og aftur
Til Íslands og aftur
Úr Íslandi og aftur
1500,-

Jólaferðir
Frá 8. desember til 7. januar
Til Keypmannahavnar og aftur
Til Billund og aftur
Til Íslands og aftur
1250,-

Vanligur APEX prísur til DK kr. 2.500,- og til ÍS kr. 2.200,-

Galdandi frá 23. oktober til 15. desember. Heystferðirnar kunnu í mesta lagi vara ein mánaða og í minsta lagi yvir leygardag og sunnudag. Ferðirnar skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan og kunnu ikki broytast ella endurrindast. Til Danmarkar skulu minst tvey ferðast saman. Ferðaavgjald kemur afturat prísinum. (Keypmannahavn 335,- Ísland 236,-)

Galdandi frá 8. desember til 7. januar. Forsølan er frá 1. november til 11. desember. Jólaferðirnar skulu vara millum 7 og 21 dagar. Ferðirnar skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan og kunnu ikki broytast ella endurrindast. Ferðaavgjald kemur afturat prísinum. (Keypmannahavn 335,- Billund 377,- Ísland 236,-)

SANSIR TEL 355355

Atlantic Airways
Tel 333 900 · www.atlanticairways.fo

Fæst á øllum ferðaskrivstovum kring landið